

## Fiskimenn forvinna 30 prosent minni

EEin norskur fiskimaður við meðalinntøku hevur 30 prosent minni inntøku enn fyri einum ári síðani. Tað sigur Alf Arne Hansen í norska sjómannafelagnum við NTB. Hann sigur, at fyri einum ári síðani var árshýran umborð á einum frystitrolara millum 450.000 og 500.000 norskar krónur, men at nú liggur hon millum 300.000 og 350.000 krónur. Alf Arne Hansen sigur, at tað er ikki tann lági fiskaprísurin nú, sum er orsøkin, tí at inntøkan er minkað støðugt tað seinasta árið. Tað hjálpir tí, at tað almenna hevur hækkað frádráttin upp í 150.000 krónur um árið frá 2009 at rokna.

# Merkja einki til kreppu enn



**Arbeiði er nóg mikið av, ungar familjur flyta til, nógv børn eru undir skúlaaldur og inntøkugrundarlagið hjá kommununi er støðugt. Sjálvt við einum manglandi undirsjóvartunli heldur Húsavíkar kommuna tørn í fólkatali, og borgarstjórin sær eina ljósa framtíð fyri kommununa**

BYGDALÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Húsavíkar kommuna umfatar bygdirnar Húsavík, Dal og Skarvanes. Umleið 130 fólk búgva í teimum trimum bygdunum, harav trý fastbúgvandi á Skarvanesi.

Jákup Martin Sørensen er borgarstjóri í Húsavíkar kommunu. Hann sigur, at fólkatalið í kommununi er nøkurlunda støðugt við tað, at nakað av tilflyting er at viga upp móti teimum, sum leggjast frá.

Men kommunan hevur stórar ætlanir.

– Vit arbeiða við einari nýggjari bygdarætlan, sum umfatar eina útstykking við 20 nýggjum grundstykkjum. Eitt av hesum er longu umbiðið, meðan ein onnur umsókn er á veg, sigur Jákup Martin Sørensen.

Eitt tað fyrsta, ein leggur merki til, tá ein kemur til Húsavíkar, eru tvey nýggj hús, sum enn standa í gerð.

– Ja, tað eru 14 dagar síðani hitt seinna varð reist, og tveir mánaðir síðani tað fyrra varð reist, so tað verður skjótt, at tey fara at flyta inn. Í báðum førum er talan um ungar familjur, sum seta búgv, so tað sær rættiliga hugaligt út, sigur borgarstjórin.

Kommunan er heldur ikki sør fyri arbeiðspláss, so eisini á tí økinum sær rættiliga ljóst út.

– Ja, vit hava fyrst og fremst Eysturbúgvan, sum hevur hoyrt til kommununa í eini 20 ár. Her í Húsavík hava vit eina frisørsalong, og so smíði eg sjálvur, og í Dali hava vit eitt snikkaravirki. Onkur annar er, sum smíðar nógv norðanfyri, so nakað av arbeiði er í kommununi, sigur Jákup Martin Sørensen.

### Hava gjørt kampingpláss

Tað er eisini nakað av felagslívi í kommununi, og bæði í Húsavík og í Dali hava tey bygdarhús.

– Tað passar. Og tað eru eisini byrjað at koma fleiri fólk hendan vegin um sumrarnar. Vit hava gjørt kampingpláss, bæði í Húsavík og í Dali, og tað sær hampiligt út við tí. Vit vóna, at tað fer at vinda upp á seg í summar, sigur Jákup Martin Sørensen.

Enn er hetta við kampingplássunum rættiliga nýtt.

– Vit byrjaðu í juli mánað í fjør, og vit høvdu einar fimm vitjanir her í Húsavík, men í Dali er plássið rættiliga væl vitjað, sigur Jákup Martin Sørensen.

Hann sigur, at nakað av ferðafólki kemur í oynna, men har í kommununi dúva tey meiri upp á skúlaflokkar, sum koma á vitjan í sjómannafelagshúsinum eins og familjur, sum koma suður at ferðast.

– Tað eru nokk so nógvir skúlaflokkar sum koma, eins og størri familjubólkar. Á kampingplássunum hava tað higartil mest verið føroyingar, sum koma á vitjan, sigur Jákup Martin Sørensen.

### Undirsjóvartunnil avgerandi

Men tað er ikki bert í Húsavík, at kommunan arbeiðir við nýggjari útstykking.

– Í Dali er eitt grundstykki klárt at byggja á, men har arbeiða vit eisini við einari nýggjari útstykking, sum skal umfata fimm grundstykkir, sigur borgarstjórin.

Útstykkingin í Dali verður gjørd um somu tíð, sum stóra útstykkingin í Húsavík verður gjørd.

– Hartil skulu vit gera eina útstykking til summarhús bæði í Húsavík og í Dali, umframt eitt ídnaðarøki at vísa á í Húsavík eisini, sigur Jákup Martin Sørensen.

Men allur aktiviteturin í Húsavíkar kommunu í samband við útstykking av nýggjum grundstykkjum kom ikki av ongum.

– Nei, tað var nógva tosið um undirsjóvartunnilin, sum av álvara setti hetta arbeiðið í gongd. Tá tað var væntandi, at tunnilin kom, bleiv eisini roknað við einari stórari tilflyting, og tí vildi man verða klárur at taka ímóti. Tey, sum byggja nú, dúva ikki beinleiðis upp á undirsjóvartunnilin, sigur Jákup Martin Sørensen.

Hann sigur, at tey, sum nú seta búgv, eru ungar familjur, sum vilja búgva í kommununi.

– Men kom undirsjóvartunnilin, høvdu uttan iva komi fleiri suður higar at búgva, heldur borgarstjórin.

### Dalstunnilin má víkja

Hann heldur, at tað sær eitt sindur svart út fyri undirsjóvartunlinum beint í løtuni, men einaferð kemur hann.

– Í 2011 fer okkurt at henda, tað hava teir so lovað, og tað dúva vit upp á í løtuni. So fær man at síggja, hvussu tað verður, sigur Jákup Martin Sørensen.

Eins og aðrir sandoyingar er borgarstjórin í Húsavíkar kommunu ikki í iva um, hvønn týdning ein undirsjóvartunnil fer at hava fyri oynna.

– Hann fer at hava ómetaliga nógv at siga. Tá fer tú at sleppa til Havnar, tá tú vil, og ikki minst fara fólk at koma suður at búgva her. Tú verður heilt nær meginøkinum við einum undirsjóvartunli, sigur Jákup Martin Sørensen.

Men undirsjóvartunnilin er ikki einasta tunnilsverkætlan, sum upptekur fólk í Húsavíkar kommunu.

– Nei, ein tunnil er teknaður til Dals. Vegurin til Dals er vánaligur, har ríður grót oman so at siga hvønn dag, so tað vóna vit fer at henda. Men vit vóna at fáa undirsjóvartunnilin fyrst, tí vit hava ofrað Dalstunnilin fyri undirsjóvartunnilin. Men kemur hann ikki, mugu vit fáa Dalstunnilin fyrst, sigur Jákup Martin Sørensen.

### Støðugt arbeiði

Sjálvur er borgarstjórin timburmaður og arbeiðir fyri seg sjálvan.

– Tað hevur verið nóg mikið at gera higartil, men tað er minkandi. Tó er altíð okkurt at gera, síðstu húsini eg smíðaði vórðu liðug fyri hálvum ári síðani, og eini onnur standa og bíða, so hjá mær hevur tað verið nokk at gera. Men sjálvandi, vit eru so nógvir um boðið, so tað verður helst for lítið til onkran, sigur Jákup Martin Sørensen.

Tað er fyri tað mesta á Sandoynni, at borgarstjórin í Húsavíkar kommunu hevur sítt arbeiði.

– Ja, tað er fyri tað mesta her suðuri. Men eg havi arbeitt nakað norðanfyri, mest fyri familju og tílíkt, sigur Jákup Martin Sørensen.